## DAGSINS MEINING

### Søgulig misgerð hevnir seg - Mugu byggja upp av nýggjum

Føroyski marknaðurin í Bretlandi er viknaður nógv seinastu árini, men tað verður trupult at byggja ein føroyskan marknað upp aftur, vísir ein frágreiðing, sum John Ranani, sendifulltrúi, hevur gjørt. Bretski marknaðurin var einaferð álitið hjá føroyskum fiskaútflytarum, men nú eru nøgdirnar ikki bara minkaðar, men harafturat fer ein stórur partur sum óvirkaðar ella hálvvirkaðar fiskavørur. Og prísirnir verða tí lágir.

Sum dømi kann nevnast, at samstundis sum íslendingar fáa hálva triðju krónu fyri íslendsku hýsuna, fáa føroyskir útflytarar bara gott og væl 1,80 krónur í meðal fyri kilo. Meginparturin av teimum 16.000 tonsum, føroyingar fluttu úr til Bretlands ífjør, eini 13.000 tons, var heil, ísað hýsa. Taka vit toskin, var ein triðingur av útflutninginum fryst fløk, samstundis sum tveir triðingar var heilur, ísaður toskur.

Ein reyður tráður í kanningini er, at vit fá ov lítið fyri okkara dýrabara tilfeingið, sum átti at fingið ein nógv betri prís, tá vit hugsað um, at fólk, ella brúkararnir, gerast alt meira og meira tilvitandi um heilsu og hvussu gott tað er at eta fisk, um vit samanbera við kjøt og ymiskar skundverðar.

Íslendingar hava tí lagt á ein annan bógv í Bretlandi og hava ment sín marknað har. Teir hava síni egnu virki, sum virka fisk og fiskavørur til tey stóru handilshúsini, sum hava deildir kríng alt landið.

Tilmælið hjá sendifulltrúanum er, at vit virka hýsuna og toskin meira og øðrvísi, soleiðis at vit fáa meira fyri okkara tilfeingi. Hesum kunnu vit taka undir við, og fyri so vítt er hetta ikki nakað nýtt, men eitt evnið, sum Sosialurin ferð eftir ferð hevur tikið fram seinastu 25 árini.

Ofta í orðaskifti við gomlu Fiskasøluna og stjóran har, Birgir Danielsen, sála, sum eftir okkara tykki viðhvørt kundi tykjast í so afturhaldssinnaður, tá tað snúði seg um spurningin at virðisøkja fiskin meira. Men tá høvdu vit so eina Fiskasølu, sum eisini sá týdningin at hava eitt virki nærhendis marknaðinum, og tí bygdi upp fiskavirkisfyritøkuna Chaldur í Stórabretlandi.

Nú verður ásannað, at vit áttu havt eitt líknandi virki nærri marknaðinum. Eisini mugu vit ásannað, at føroyingar bóru seg illa at, tá virkið í Bretlandi glapp av okum av hondum í kjalarvørrinum frá búskaparkreppuni í 90-arunum, tá fyrst Jóhan Páll Joensen, formaður í Føroya Banka, og danski virkiseigarin, Uhrenholdt, keyptu virkið og seinri seldu tað aftur til íslendska Coldwater.

Seinastu dagarnar er fleiri ferðir staðfest, at Realurin legði seg eftir at bjarga skipum, so øll tey góðu skipini ikki fóru av landinum. Tíverri mugu vit ásnna, at tað sama hendi ikki við hesum virðunum, Fiskasølan hevði bygt upp í Onglandi, hóast røddir ávaraðu ímóti tí, at virkið glapp okkum av hendi.

Hetta er søga nú, og vit eiga at taka orðaskifti upp um, hvussu vit aftur kunnu byggja upp ein góðan marknað við vørum, sum vit fáa meiri fyri, so íkastið til føroyska búskapin verður størri, tí tað er neyðugt, vit skulu skapa ein sjálvberandi búskap. Um hetta mugu land og vinna samstarva, sum John Rajani so greitt mælir til.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Framferðarhátturin hjá borgarstjóranum á Tvøroyri

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



At borgarstjórin óbeinleiðis hóttir, havi eg fullan rætt til at halda, tá ið eg lesi greinina í Sosialinum tann 22. januar og við at lesa greinina hjá borgarstjóranum í Dimmu 8. februar, undirbyggir tað bert mína fatan av óbeinleiðis hóttanum.

**Óalmennur býráðsfundur?**

At samla alt býráði til ein óalmennan fund fyri at viðgera mína grein frá 24 januar í fjølmiðlunum,fati eg sum, at onkur følir seg raktan av greinini.

Síðani hendur tað margháttliga, at referat frá einum óalmennum fundi kemur í fjølmiðlarnar, har nøvnini hjá øllum býráðsliminum uttan navni hjá borgarstjóranum standa undir.

Tað verður áhugavert at síggja tey komandi fýra árini, hvat kemur út frá býráðsskrivstovuni til fjølmiðlarnar, frá óalmennum býráðsfundum á Tvøroyri, har persónsmál verða viðgjørd.

**Óbeinleiðis hóttan**

Hvat er nú tað. Jú, eg lesi tað sum eina óbeinleiðis hóttan, tá ið borgarstjórin 22. januar sigur, at tað er ikki fremjandi fyri samstarvið, at Hvalbiar-og Fámjins kommunur viðgera eina áheitan frá Landsstýrinum og í Dimmu 8. februar skrivar, at býráðslimir á Tvøroyri skulu umhugsa sýna støðu í býráðnum, tí teir gera viðmerking til grein undir heitinum "Borgarstjórin á Tvøroyri hóttir als ikki nakrar kommunur í Suðuroy."

Eftir hesari greinini frá borgarstjóranum fær mann tað fatan, at gera býráðslimirnir ikki sum borgarstjórin dikterar, ja, so blíva teir blakaðir úr samgonguni.

Men tað er hóast alt seks býráðslimir og bert ein borgarstjóri í samgonguni.

Livst so spyrst

# Góði Gerhard

**Sólvit Simonsen**



Eg síggi nú í bløðunum, at tú er mestsum í villareiði av ítróttarhøllini, ið ætlanin er at byggja. Eg skilji hetta ikki so væl við tað, at nú er nokkso long tíð fráliðin, síðan tú fortaldi fyri mær, at tú hevði sjálvur verið í landsstýrinum og ornað paragraffin og nú var klárt at undir høllina. Nú er drúgv tíð gingin, síðan farið varð undir fyrireikingar til Ítróttarhøllina, so tað mátti borið til at sett pengar av til verkið. Hvat innlit tú hevur í Sands kommunu veit eg ikki, men tú eigur at finna tær sannleikans keldur, tí Sands kommuna er opin. Vit fáa referat frá øllum kommunufundum, somuleiðis fáa allir borgarar roknskap, so halt teg til sannleikan.

Skopunar kommunu veit eg ikki beskeð um, so har gangi eg út frá at tú sigur sannleikan. Eg havi kannað prísin á einari ítróttarhøll og er hasin prísurin, sum tú upplýsir, ikki skrivaður við penum penni.

Tað er annars gleðiligt við tí góða samstarvi í oynni, har hvør svarar hvørjum sítt. Jú Gerhard, vit eiga øll í oynni ein fagran ungdóm, tú skuldi verið við til dystirnar á Meginskúlanum og sæð hesar ungu skopuningarnar, hvussu raskir teir eru at spæla fótbólt, so hevði tú helst havt hug at givið teimum betri umstøður.

Víðari skrivar tú, at tú ætlar ikki at avreiða tína heimbygd, tað er soleiðis vorðið við avreiðing, at tað krevur ein dugnaligan skipara at standa við róðrið fyri at leggja í fisk; men liggur tú við turrum dekki, so er ikki nógv at avreiða.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.